## Ongar stjørnur til Chelsea

Nevndarformaðurin í Chelsea boðar frá, at felagið ikki fer at keypa nakað stórt navn til komandi kappingarár.
Tá ið flytingarvindeygað letur upp, er tað vanligt Chelsea, ið keypir flest leikarar. Soleiðis verður møguliga aftur í ár, men ongar stjørnur verða keyptar.
- Eingin skal vænta nakra stjørnu til Chelsea. Vit halda ikki, at tørvur er á tí. Vit fara at leita okkum eftir góðum leikarum at seta á beinkin, gjarna einar 3-4, sigur nevndarformaðurin í felagnum, Peter Kenyon, við enska BBC.



## Claus Bech nærri uppflytingini

Blackpool, sum hevur føroyska Claus Bech Jørgensen í hópinum, hevur spælt seg í finaluna um at flyta upp í næstbestu ensku fótbóltsdeildina. Blackpool spældi leygardagin seinnu Play Off hálvfinaluna ímóti Oldham, og Blackpool vann dystin 3-1. Blackpool vann eisini fyrru hálvfinaluna, og liðið kom tí víðari við einum tryggum 5-1 sigri.
Vinnur Blackpool finaluna, flyta teir upp í The Championship, ið er næstbesta deildin í Onglandi. Mótstøðuliðið í finaluni verður vinnarin av Nottingham Forest og Yeovil Town.

B36-VB/Sumba 2-0 (2-0):

# Ókeypis verjumistøk

*B36*

*VB/Sumba*

**B36 var nær við at endurtaka javnleikin móti botnliðinum. Men VB/Sumba megnaði ikki at taka av, tá møguleikarnir komu**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Dysturin í Gundadali er ein av teimum, sum skjótt fer í gloymibókina.
B36, sum er við í oddastríðnum, tók ímóti botnproppinum, VB/Sumba, og fyrstu lítlu løtuna av dystinum var klassamunurin sjónligur. Framrættaða B36-liðið, sum til tíðir líktist gomlu brasilsku 4-2-4 uppstillingini, legði stórt trýst á fyrstu løtuna, men ætlaða málskolan varð tó av ongum.
Tó at velduga trýstið linkaði, sum minuttirnir gingu, so var B36 framvegis ománá, og tvær ferðir megnaðu teir eisini at koma til møguleikar. Báðu ferðirnar slapp Hanus Thorleifsson leysur í høgru, og báðu ferðirnar endaði innleggið fyri føturnar á Sylla, sum umsetti til mál. Sylla kundi enntá skotið reint hattrick, men linjuverjin metti tó, at talan var um rangstøðu, tá ivorianski framherjin var fyrstur á returi eftir royndi frá Bergi Midjord.
Eftir steðgin var talan framvegis um leikliga yvirvág til B36, men tað var tó so sum so við møguleikunum. Heldur hevði B36 nú fótin á koblingini, og tí gekk nógv fyri seg í tómgongd í bæði álops- og verjuparti.
Og vóru gestirnir bara eitt lítið sindur neyvari, so kastaði hetta mál av sær. Tvær ferðir varð Jón Krosslá Poulsen mest sum púra blankur, og ta einu ferðina stútaðu gestirnir á stólpan, tá markeringarnar hjá vertunum vóru alt annað enn neyvar.
Talan kundi verið um endurtøku frá í fjør, tá B36 misti stig á heimavølli móti júst VB/Sumba, hóast spælbýtið í sjálvum sær ikki borgaði fyri hesum.
Árstalsfelagið slapp tó við skrekkinum, og ivaleyst vóru tað eisini stigini, sum taldu mest, tá dómarin hevði blást seinastu ferðina.
Trý stig og ein frálíkur summardagur vóru tað, sum heimaáskoðararnir fegnaðust um, meðan VB / Sumba enn eina ferð mátti stigaleyst av vøllinum. Enn er kanska ikki alt tapt, men útidysturin móti AB komandi umfarið verður helst løtan, har suðuroyingar fáa at vita, hvørt teir kanska hava lið í bestu deildini í



*Langt var millum tøttu nærdystirnar í Gundadali, men her eydnaðist tað so myndamanninum at fanga ein av slagnum mllum Fróða Benjaminsen og Suna úr Hørg*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Óttaðist endurtøku

Alex José dos Santos var sjálvandi nøgdur um tey trý stigini, sum B36 vann sunnudagin. Men hann var langt ífrá nøgdur um spælið, sum hann og liðfelagarnir sýndu í seinna hálvleiki.
- Vit seta ferðina alt ov langt niður, og tað kundi væl kostað okkum dystin. Teir sleppa jú fram til fleiri stórar møguleikar eftir steðgin, uttan at vit nakran tíð megna at lyfta liðið aftur.
Óttaðist tú fyri, at 2-2 javnleikurin móti júst VB/Sumba frá í fjør skuldi endurtaka seg?
- Ja, tað gjørdi eg. Tíbetur megnaðu vit at halda fast um tey trý stigini. Tað var tað týdningarmesta. Men hetta var ein kraftig áminning um, at ein fótbóltsdystur skal spælast í 90 muinuttir, helt bakkurin hjá B36.
**-mørk**

# Kappingin gongur í trimum

**Botnliðini fara skeiva vegin, og toppurin leggur sjógv millum seg og tey, ið royna at renna aftaná**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Mest óvæntaða úrslitið hesa ferð var, at tað enn eina ferð eydnaðist GÍ at vinna øll stigini ímóti HB. Hetta var aðru ferð í ár, at HB ikki fekk nakað burturúr, tá ið GÍ var mótstøðuliðið. GÍ heimasigurin var tann fyrsti í næstan eitt ár.
At FM favorittarnir úr HB ikki megna at fáa úrtøku, ber beinanvegin ivaspurningar við sær. Hóast teir vóru rættiliga skerdir, so eydnaðist tað teimum í oddaliðnum EB/Streymi at vinna øll stigini á Argjum. Harvið er munurin frá EB/Streymi og aftur til HB á fjórða plássi øktur til sjey stig. Tað kann tykjast av nógvum, men sammett við gloppið, sum í fjør heyst var ímillum somuk lið, so er hetta fyri einki at rokna.

### Toppurin

Tey trý fremstu fingu fult. EB/Streymur og NSÍ á útivølli ímóti ávikavíst AB og Skála, og B36 á heimavølli ímóti VB/Sumba.
Felags fyri allar tríggjar sigrarnar hjá toppliðunum var tað, at avrikini ikki vóru so sannførandi, at tað væl ber til at siga, at tað framvegis er soleiðis, at øll hava møguleika at vinna stig ímóti øllum. Besta dømið um hetta var í Gundadali, har B36 syfti botnliðið VB/Sumba 2-0. Men tað var kortini soleiðis, at gestirnir úr Suðuroy høvdu møguleikar at skjóta fleiri mál.
NSÍ og EB/Streymur skulu 2. hvítusunnudag spæla á heimavølli ímóti ávikavíst B71 og GÍ. B36 skal leygardagin – hvítusunnuaftan - spæla í Klaksvík.

### Botnurin

Stigatalvan boðar eftir 10. umfar frá, at nú kappingin er gott og væl ein triðing gomul, eru VB/Sumba og AB ikki frítt avbyrgd á plássunum, sum eftir kappingarlok bera niðurflyting við sær.
Hóast støðan sær hættislig út, so hava hvørki teir í AB ella teir í VB/Sumba enn mist vónina um, at tað skal bera til at venda gongdini. Úrslitini í 10. umfari boða ikki frá, at botnliðini hava slept endanum – so langt í frá.
Hjá AB eru tað seks stig fram til bjargingarplássið, sum KÍ nú verjir, og hjá VB/Sumba er vegurin at ganga átta stig. At AB higartil hevur fylgt væl við, sæst aftur á málmuninum. Hóast AB hevur tapt sjey ferðir, bara vunnið eina ferð og tvær ferðir verið partur av javnleiki, so er málmunurin ikki verri enn 10 mál í minus.
2. hvítusunnudag verður sonn botnuppgerð, tá ið VB /Sumba fer at vitja á Argjum. Tá ið AB í fyrsta umfari var á Vágseiði, vann heimaliðið 1-0.

### Miðjan

Eftir tapið í Sarpugerði er HB fýra stig og í hvussu so er tvey umfør frá bronsuplássinum. Higartil hevur verið roknað við, at meistararnir fara at vera við í heiðursmerkjastríðnum. Men higartil hevur HB altso ikki sýnt neyðuga støðufestið.
GÍ leyp bukk upp um bæði B71 og Skála. Seks stig burturúr tveimum seinastu umførunum bera við sær, at GÍ hevur lyft seg upp í fremra partin av kappingini. Um tað 2. hvítusunnudag fer at eydnast gøtumonnum at vinna í Streymnesi, fer at síggja heilt gott út hjá teimum.
Skálamenn, sum 2. hvítusunnudag skulu í Gundadal at vitja HB, siga seg framvegis fyrst og fremst hugsað um at sleppa heilt undan hóttanini úr botninum. Tá ið teir gera tað, eigur hetta eisini at vera tema bæði í Klaksvík og á Sandi. Um AB fær fult ímóti VB/Sumba, og um KÍ einki fær burturúr á heimavølli ímóti B36, og B71 einki fær burtur úr í Runavík, so verður neyðugt at endurskoða, hvar markið millum botn og miðju fer at ganga.